DEKKMASTER.FO

...tá ið prísurin eisini er avgerandi!

Allar tær kulu



Nógv góð og bilig dekk á goymslu!

DEKKMASTER.FO

www.dekkmaster.fo
info@dekkmaster.fo
telefon 227 000


# OLJUTINGIÐ

Petroleum Association of the Faroe Islands

## Heystting og aðalfundur í Oljutinginum

# Oljuprísurin

**Vit bjóða til heystting týskvøldið 16. september 2008 kl. 19.00 á Hotel Føroyum.**

Oljuprísurin er nógv hækkaður tey seinastu árini, og tað hevur verði nógv snakkað, um hvat vit kunnu vænta okkum av oljuprísinum í framtíðini, og hvørjar avleiðingar kunnu vera av einum høgum oljuprísi. Røðarnir á oljutinginum, Richard Hardman, ið er nevndarlimur í Atlantic Petroleum UK Ltd., hevur 35 ára royndir í at leita eftir kolvetni í Norðsjónum, og Magni Laksáfoss, búðskaparfrøðingur og fyrrverandi landsstýrismaður í fíggjarmálum, fara at røða um oljuprísin. Við støði í teirra fakligu bakgrund og royndum, fara teir at geva sínar metingar um, hvat vit kunnu vænta okkum av oljuprísinum í framtíðini.

Vinarliga boða Vinnuhúsinum frá luttøku í seinasta lagi 16. september kl. 11.00 á telefon 309900 ella umvegis teldupost: industry@industry.fo

Atlantic Petroleum stuðlar tiltakinum.

**Vælkomin**

**OLJUTINGIÐ**

Atlantic Petroleum




# Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 598599)**


# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Starvsfólk til Útbúgvingarlonina á D7

Til undirvísing í kognitivu útbúgvingini søkja vit eftir sjúkrarøktarfrøðingi til setan 1. oktober 2008 ella skjótast til ber. Talan er um eitt fulltíðarstarv.

Saman við øðrum verður tú við til at leggja til rættis, undirvísa og seta í verk kognitivar viðgerðarhættir á Psykiatriska deplinum.

Starvsstaðið verður á Daglonunum og næsti fyrisetti er leiðarin á Daglonunum

**Førleikakrøv:**
- autorisatión sum sjúkrarøktarfrøðingur
- í minsta lagi 5 ára starvsroyndir innan psykiatri
- kognitiv útbúgving og eftirútbúgving
- arbeiðsroyndir við kognitivum viðgerðarhættum
- evnir at samstarva í toymum
- royndir at undirvísa
- áhuga innan gransking

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt áhugavert og mennandi starv við nógvum avbjóðingum
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- positivt tvørfakligt samstarvi við nógvum eldsálum

Nærri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Súsonnu Olsen, deildarleiðara á tlf. 304500, lok. 4170, t-post: lssusol@ls.fo ella Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lok. 4102, t-post: lsberwe@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 26. september kl. 12.00**

## Sjúkrarøktarfrøðingar til B7

Vit søkja eftir sjúkrarøktarfrøðingum til fulltíðarstørv í skiftandi vaktum til setan 1. oktober 2008 ella eftir avtalu. Møguleiki er fyri lægri brøki:

- 3 føst størv
- 1 avloysarastarv til og við 30. september 2009
- 1 avloysarastarv vegna barnsburð til og við 30. september 2009

B7 er ein nýumvæld medisinsk deild, sum hevur hesar sergreinar: Lungnamedicin, nefrologi, hæmatologi, apoplexi, rheumatologi og onkologi. Tvørfaklig menning við undirvísing og skeiðvirksemi innan serøkini heldur áfram. B7 er eisini byrjað við tvørfakligum konferensu hvønn morgun. Aðrar áhugaverdar avbjóðingar, sum liggja fyri framman, verður implementering av THS.

**Arbeisðuppgávur í høvuðsheitum**
- røkt og viðgerð til sjúklingar innan áðurnevndu sergreinar

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan medisinsku sjúkrarøktina
- góð stvørfaklig samstarvsevni
- teldukunnleiki

**Vit kunnu bjóða**
- innleiðslu
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv
- ávirkan á fakliga menning
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum

Fyrimun hava umsøkjarar við kliniskum royndum innan sergreinarøktina og viðgerðirnar innan serøkini á deildini.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Jónu Sigmundardóttir deildarleiðara á B7 á tlf. 304500, lok. 6067

**Umsóknarfreistin er 29. september 2008 kl. 12.00**

## Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum

(sí meira á www.lsh.fo)

**Starvsfólk til Fíggjardeildina**
Umsóknarfreistin er 19. september 2008 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til A2/Føðideildina**
Umsóknarfreistin er 22. september 2008 kl.12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn



**Á Landssjúkrahúsinum**
- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo